## DAGSINS MEINING

# Varðveiting og skynsemi

Fríggjadagin handaðu tveir mans borgarstjóranum í Havn 3.186 undirskriftir til tess at mótmæla ætðanunum um at byggja ein stóran bygning á økinum, har húsini hjá Anton Degn hava staðið seinastu øldina.

Tað var annars vorðið til eitt avgreiðslumál hjá byggi- og býarskipanarnevnd Tórshavnar býráðs at geva byggiloyvi, tí ánarin av húsunum helt seg innan fyri byggisamtyktina við ætlan-um sínum. Hann kannaði eisini øll hesi viður-skifti, áðrenn hann ognaði sær húsini.

So kunnu vit spyrja, um tað er røtt mannagongd at steðga privatum ætlanum, tí at nøkur fólk eru misnøgd við tað, sum ein maður ger við ogn sína.

Tað er so tann stóri spurningurin. Men sjálvsagt viðkemur tað øllum, hvat hendir í miðbýnum. Men samstundis kunnu vit spyrja, hví Tórshavnar Býráð als ongar ætlanir hevur fyri slíkar býarpartar, sum eitt nú Tinghúsvegin. Tað eru nógvir slíkir býlingar í Havnini, sum áttu at verið varðveittir, men einasta serstaka byggisamtykt, sum er, fevnir um økið úti á Reyni og Tinganes. Har eru greiðar reglur um, hvat kann gerast og ikki, og eingin forkeypir seg har, tí har er tað púra greitt, at ongar slíkar broytingar kunnu gerast.

Tá fyrri eigarin av húsunum hjá Anton Degn setti tey í stand fyri nøkrum árum síðani, søkti hann Tórshavnar Kommunu um stuðul. Hóast tað bara er byggisamtyktin fyri Reyn, sum bindir býráðið til at stuðla slíkum umvælingum, so hendir tað javnan, at býráðið stuðlar slíkum varðveitingarætlanum, sum liggja aðrastaðni. Húsini hjá Anton Degn eru eitt dømi.

Hetta er eisini í fínasta lagi. Sjálvsagt eiga slíkar ætlanir at verða stuðlaðar, tá tær sampakka við varðveiting av friðaðum ognum og arbeiðið verður gjørt tilsvarandi og undir eftirlitið. Men tað er sera vánaligt politiskt handverk í Tórshavnar Býráð ikki at treyta sær krøv á eina slíka ogn. Tað er beinleiðis ábyrgdarleyst av byggi- og býarskipanarnevndini at játta slíkan stuðul – uttan at tryggja sær, at húsini verða varðveitt. Tað hevur byggi- og býarskipanarnevndin so ikki gjørt í hesum føri, og harvið hevur nevndin forkomið 200.000 almennum skattakrónum. Slíkt er átaluvert!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Um talgilda heilsuskipan í føroyska heilsuverkinum

**Hans Pauli Strøm**
*landsstýrismaður*



Í sambandi við grein í Dimmalætting 17. mars 2004 undir heitinum »Talgild heilsuskipan útsett til næsta ár« og grein á portalinum hjá Dimmalætting undir heitinum »Býráðið tekur málið í egnar hendur« hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hesar viðmerkingar.

Tað er rætt, at peningur ikki er settur av til keyp av eini tílíkari skipan í 2004, men peningur er settur av til framhaldandi fyrireikingararbeiði. Eisini verður arbeitt við at leggja eina verklagslóg fyri Løgtingið, sum gevur landsstýrismanninum heimild at undirskriva avtalu um keyp av talgildari heilsuskipan.

Verður verklagslógin samtykt í Løgtinginum, er einki til hindurs fyri, at arbeiðið við talgildari heilsuskipan heldur áfram eftir núverandi leisti og tíðarætlan.

# Sjálvstýri er frælsi

**Erling Simonsen**



Í Sosialinum 18. mars 2004 skrivar Jógvan Jacobsen at sjálvstýri er frælsi. Eg spyrji frælsi fyri hvønn og til hvat?

Í verandi støðu geri eg hvat eg vil. Havi eg hug at ganga ein túr, so geri eg tað. Ætli eg mær at keypa ein bil, so geri eg tað. Havi eg hug at keypa mær eini hús, so geri eg tað, ella fara ein túr uttanlands við konuni, ja eisini tað bestemmi eg sjálvur. Tað vil siga, at alt eg havi hug til, tað geri eg, bara uttan at spyrja nakran eftir!

Taka vit so makthavararnar, ja so gera eisini teir hvat teir vilja. Tak bara síðstu samgongu, hon hevði hug at hækka útreiðslurnar á løgtingsfíggjarlógini við 50% yvir 5-6 ár, ja hon gjørdi tað bara. Samgongan vildi yvirtaka navnalógina, hon gjørdi tað bara, samgongan ætlaði eisini at yvirtaka eini 20-30 onnur mál, men tordi ikki, og gjørdi tað tí ikki, samgongan slitnaði!

Ikki at gloyma blokkin, samgongan helt tað vera stuttligt at blaka 1 millión um dagin í havið, hon gjørdi tað bara, so kom ikki og fortel fyri mær, at ikki nógv ber til við verandi heimastýrislóg.

Eg vil gjarna hava at vita frá Jógvan Jacobsen hvat verður so nógv øðrvísi við sjálvstýri!

Tað einasta, ið hendir er at makthavararnir fáa enn størri makt, tann meinigi Palleba fær neyvan størri persónligt frælsi, heldur minni.

Við fullum sjálvstýri skal Palleba gjalda ein enn størri part av ballinum, sum um Palleba ikki betalir nóg mikið!

Við persónligari frælsiskvøðu.

# Tá vóru 6 kvinnur á tingi

VIÐMERKING
*Rúna Sivertsen*



Í grein í Sosialinum, 10. mars, skrivar Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður við javnstøðumálum, at hægsta talið á kvinnuligum løgtingslimum nakrantíð er 5 Men her fer landsstýrismaðurin skeivur.

Mitt í valskeiðnum (1994 -98) sleit Javnaðarflokkurin samgonguna, og Fólkaflokkurin kom inn í staðin. Hetta var á sumri í 1996.

Í juli mánaði sama ár varð Anfinn Kallsberg settur sum landsstýrismaður við fíggjarmálum, og eg tók sæti á tingi fyri hann.

Sostatt vóru 6 kvinnuligir tinglimir frá juli 1996 til apríl 1998, tá val varð útskrivað. Tær vóru, Maria Hansen, Lisbeth L. Petersen, Marita Petersen, Helena Dam á Neystabø, Ingeborg Vinther og Rúna Sivertsen.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Nýggi Smyril flotaður




Her liggur nýggi Smyril hann bundin við bryggju. Nú skal yvirbygningurin setast omam á og síðani skal hann innrættast

**Leygardagin var stór hátíðarhald á IZAR-skipasmiðjuni í Spania, tá ið nýggi Smyril varð flotaður**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygardagin var ein stórur dagur hjá Strandferðsluni, suðuroyingum og øllum føroyingum.

Tá fór varð nýggi Smyril flotaður klokkan 14 føroyska tíð.

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hetta var ein stórfingin og hátíðarlig løta.

Spanska skipasmiðjan hevði gjørt nógv meiri burturúr, enn vit høvdu væntað og eini 200 fólk vóru komin saman á skipasmiðjuni.

Úr Føroyum vóru Bjarni Djurholm og ein fulltrúi úr vinnumálaráðnum til staðar, umframt tekniska leiðaran á Strandferðsluni. Til staðar vóru eisini teir tveir aðrir føroyingar, sum eru á skipasmiðjuni og fylgja við byggingini.

Annars vóru nógv arbeiðsfólk á Skipasmiðjuni til staðar og skilligt var, at tað var eisini ein stórur dagur hjá teimum, tí nógvir teirra høvdu konu og børn við.

Eftir gomlum siði har um leiðis, kom ein prestur at signa skipið og hann las eisini upp úr bibliuni.

Eftir sponskum siði skuldi skipið eisini hava eina gummu, hóast tað ikki varð doypt sum so hendan dagin.

Og tað skuldi vera eitt konufólk og tað skuldi vera úr landinum, sum átti skipið.

Einasta konufólk úr Føroyum, sum var til staðar, var Una Joensen, kona Magnus Magnussen, tekniska leiðara á Skipasmiðjuni og hon fekk so heiðurin at klippa snórin og at bróta eina fløsku ímóti skrokkinum.

Magnus Magnussen sigur, at alt gekk av tí allarbesta og Smyril flýtur ótrúliga flottur í sjónum.



Tey standa høgt uppi í einum torni, tá ið Smyril varð signaður og doyptur. Tað, sum kemur undan á Smyrli, er sjálvt kúlustevni




Smyri, Tvøroyri, stendur á hekkuni á nýggja flaggskipinum hjá Strandferðsluni